# Stórur steinur leyp undan loftinum

**Ein maður, ið kom koyrandi gjøgnum Árnfjarðatunnilin hósmorgunin um klokkan 11, mundi gerast heldur skakkur, tá hann brádliga kom fram á ein stóran stein, sum lá á akbreytini.**

GRÓTLOP
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Her sæst steinurin, sum leyp undan loftinum, meitlaður í fimm smærri petti*
*Mynd: Høgni Thomsen*

Klokkan 11.10 hósmorgunin fekk løgreglan í Klaksvík boð frá einum manni, at ein stórur steinur var lopin undan loftinum í Árnfjarðatunnilinum, umleið ein triðing inni í tunnilinum frá Ánunum. Boð vóru beinanvegin send eftir fólki frá Landsverk at fáa steinin beindan av vegnum.

Petur á Svøð frá Landsverk kom á staðið beinanvegin, og hann greiðir frá, at steinurin var rættiliga stórur, og at hann vá umleið 100 pund.

- Um ein bilur hevði fingið henda steinin omanyvir seg, ella hevði rent á hann, hevði hann allarhelst farið í smildur. Maðurin, sum kom fram á steinin, var á veg úr Árnafirði, og hann gjørdi tað rætta, tá hann vendi við, koyrdi aftur til munnan Árnfjarðamegin og vardi fyri einari møguligari vanlukku. Hann boðsendi eisini løgregluni beinanvegin, og tískil slapst undan eini vanlukku, greiðir Petur á Svøð frá.

### Tunnlarnir tryggir hóast alt

Hóast hesin stóri steinurin leyp undan loftinum og kundi elvt til skaða, sigur Petur á Svøð at tunnilin er tryggur at ferðast gjøgnum.

- Tað kemur tíverri fyri, at grót leypur undan loftinum, men tunnlarnir eru tryggir hóast alt. Sjálvt um tunnlarnir javnan verða tryggjaðir fyri leyst grót, ber ikki til at verja seg 100 prosent ímóti at sovorið hendir. Tað fer altíð at vera ein vandi fyri at onkur steinur leypur undan loftinum, men tíbetur hendir hetta sjálvdan, og við at tryggja tunnlarnar, slepst tí undan at hesin vandin gerst serliga stórur, sigur Petur á Svøð.

Tunnlarnir í Norðoyggjum eru myrkir og smalir, og tí er neyðugt at fólk vísa varsemi tá tey ferðast gjøgnum tunnlarnar. Og við at gera sum hesin maðurin gjørdi, at boðsenda løgregluni og at ávara aðrar bilførarar, slepst undan at nøkur vanlukka hendir, og tað gjørdi tað tíbetur heldur ikki í hesum føringum.

# Formaður lærarafelagsins tykist vera amboð samgongunnar

JÓGVAN VIÐ KELDU:



**Tað eru ikki tunlar sum hava skuldina av, at føroyski**

**fólkaskúlin ikki virkar nóg væl. Hetta er ov bíligt og pínligt**

Havi lisið oddagreinina í næstseinasta skúlablaði, har formaður Føroya Lærarafelags beinleiðis leggur samferðsluútbyggingarnar í Føroyum undir at gera, at undirvísingarstøðið í fólkaskúlanum ikki hækkar, og tann "lærdi" fer av landinum.

Fari at minna á, at "bert" 6% av løgtingsfíggjarlógini fara til íløgur. Av hesum fer helmingurin til sokallað "bleyt virði", hvat tað so er fyri nakað, meðan restin - einans 3 prosent - fara til samferðsluútbyggingar. Sokallaður beytu virðini hava vanliga risarakstur við sær, meðan hin parturin hevur lítlan og ongan rakstur. Umframt hesar íløgur leggja kommunur eyðsýndar íløgur í fólkaskúlan.

Væl veit eg, at sami peningur ikki kann nýtast á tvinnm økjum, eins og fólkið ikki kann virka á tveimum støðum samstundis.

**Samferðsluútbyggingar trý prosent**
Formaður lærarafelagsins heldur, at politikarin er komin stutt, er visjónsleysur og tí ikki tykist koma úr stað, tí hann nýtir heili 3 prosent til samferðsluútbyggingar.

Tað vil siga, at útbúgvingarverkið ikki er nøgt, uttan tað eisini fær hesi trý prosentini. Eg freistist at spyrja, um hesin rennur ørindi fyri ferðslumálaráðharran, sum jú er Tjóðveldisfólk, um Skúlablaðið nú eisini er vorðið politiskt málgagn?

Hvat hugsar hann? Er føroyska lærarastættin vorðin ein samfeldur grenjandi visjónsleysur flokkur, sum bara situr og bíðar inntil hesi trý prosentini til íløgur - samfeðslan – eisini verður skrykt undan føroyska fólkinum. Her er tørvur á arbeiði!

Spurningurin kann eisini setast, hvar hesin maður býr, og hvønn tørv hann hevur á seamferðsluútbygg ingini. Er talan um reina egoismu? Sjálvur hevur hann møguliga ikki so nógv brúk fyri samferðsluni, meðan bæði vinnan, mentanin, handilslívið og størsti parturin av føroyska fólkinum hevur brúk fyri dyggum samferðslumøguleika, eisini lærarar sum búgva uttan fyri høvuðsstaðin. Bráneyðugt er at útbyggja okkara lítla land, so í øllum førum stóru økini fáa fast samband. Vit eru ov seinir á veg!

**70% til "bleytu virðini"**
Av allari fíggjarlógini fara ikki færri enn 70% av rakstrinum til almanna- og heilsumál og útbúgving og gransking, og ónøgdin økist lutfalsliga við meirjáttanini.

Eitt er hvat formaðurin sigur. Hvat sigur restin av lærarastættini, her meini eg eisini teir, sum búgva úti um landið? Er so lítil stirðil eftir í okkara útbúna fólki, sum skal leiða ungdómin?

Nei, tað er pínligt og ov bíligt av lærarastættini at leggja skuldina av einum útbúgvingarverki sum ikki virkar, yvir á samferðsluútbyggingarnar sum bert kostað árliga 3% av fíggjarlógini og hava lítlan og onga rakstrartyngd við sær.

Takið tykkum um reiggj! Kundi tykst, sum formaður Føroya lærarafelags er amboð samgongunnar.

*www.keldu.com*
*keldu@post.olivant.fo*

# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Benny Samuelsen 80 ár:

## Hevur arbeitt fyr

Leygardagin 2. august verður fyrrverandi blaðstjórin á Dimmalætting, Benny Samuelsen, 80 ár.

Sigast kann um Benny, at hann er av góðum sambandsbergi brotin. Abbi hansara var tann "legendariski" sambandshøvdingurin Andrass Samuelsen, sum endaði sína politisku karrieru sum fyrsti løgmaður í Føroyum 1948-50.

Andrass var ættaður úr Haldarsvík, men gjørdist sýslumaður í Fuglafirði. Tí er Benny upprunaliga fuglfirðingur. Hann er sonur Lenu, f. Midjord, og Steingrím Samuelsen, sum gjørdist sýslumaður eftir pápan. Benny og tey vóru ikki færri enn 12 systkin. Ein beiggi er Stanley, sum hevur undirhildið í Miðlahúsinum nú um ólavsøkuna.

Nokk so nógvir av beiggjunum komu at arbeiða sum prentarar á Dimmalætting. Her var eisini ættarsamband. Pápabeiggin Georg L. Samuelsen byrjaði sum prentari á Dimmalætting blaðungur, og hanm gjørdist seinni kendur blaðstjóri á blaðnum.

Benny kom 14 ára gamal í 1943 í læru sum setari á Dimmalætting. Er tað nakað fak sum er broytt, so er tað hetta. Tá ið Benny byrjaði var bert talan um at seta við hond. Bókstavirnir lógu leysir í einum kassa, og setingin var at taka bókstav fyri bókstav úr kassanum og seta teir saman til tekst. Tá líðugt var at prenta skuldu bókstavirnir leggjast aftur í hvør sítt rúm í kassanum. Hetta ljóðar tungt, men gekk tó skjótt fyri seg.

Tað var so eitt. Men manuskriptini vóru ofta skrivað við hond, og vóru sera ymisk til lesiligheit. Stavirættleikin mundi ofta vera so sum so. Tá ið setararnir komu til arbeiðis valdu teir sær tey "bestu" manuskriptini, sum vóru best lesilig. Teir sum komu seinast máttu so taka hini handritini.

Tað var eitt stórt framstig, tá ið Dimmalætting í 1947 fekk setimaskinu, har tað bert skuldi trýtast á ein knøtt fyri hvønn bókstav eins og á eini teldu. Hvør einstøk regla varð stoypt í blýggi. Benny gjørdist so maskinsetari. Tað var í síni tíð tikið til, hvussu skjótt hann klárari at seta. At seta við maskinu lætti nógv um. Men korrekturur skuldi lesast, og var feilur í einum orði, skuldi reglan setast av nýggjum og fáast uppá rætt pláss í satsinum.

Nú er einki, sum eitur setari longur. Tey, sum skriva greinirnar, gera tær samstundis klárar til at seta upp til prentingina. Tað er heldur einki sum eitur korrekturlesing! Hetta man ofta síggjast aftur.

### Gjørdist blaðstjóri

Í 1970 kom Benny at skriva fyri Dimmalætting saman við Georg. Hann hevði ein serligan førleika til hetta arbeiði sum setari. Setarar dugdu ofta væl at at skriva føroyskt, tí ofta máttu teir rætta í tekstinum, so hvørt teir settu, og tí gjørdist málið so gott.

Tað var tí eisini náttúrligt, at Benny gjørdist blaðstjóri á Dimmalætting í 1981, tá ið pápabeiggin Georg legði frá sær. Hetta starv hevði hann fram til 1995, tá ið hann fór frá fyri aldur.

Hann hevur verið formaður og er framvegis nevndarlimur í Dimmalætting. Hetta merkir, at Benny inntil nú hevur verið virkin á Dimmalætting og harvið í føroyska blaðheiminum í samfull 65 ár.

Her hava sanniliga verið broytingar. Tað varð sagt, at tá ið Georg kom á Dimmalættimg var hansara arbeiði at prenta við handakraft. Tá ið Benny kom var pressan rikin við elmegi. Sum sagt varð sett við hond. Blaðið kom út mikudag og leygardag, og tað var 4 síður hvørja ferð. Hvørt blað skuldi leggjast eitt fyri eitt í pressuna fyri hvørjar tvær síður og skuldi síðan faldast við handakraft. Hetta merkir, at fyri árið komu út 100 bløð, og samlaða síðutalið var um 400. Nú koma 250 bløð. Prentað verður við rúkandi ferð og blaðið kemur samanlagt út uttan at nakar nertir tað. Siga vit, at blaðið er 20 síður í miðal, verður hetta 5.000 síður ella meira enn 10 ferðir tað, sum var, tá ið Benny byrjaði. Hetta er ikki smávegis kollvelting. Leysasøluprísurin var eisini ein annar. Hann var 10 oyru fyri blaðið!

Benny dugdi væl at skriva. Men hann gjørdi sær eisini ómak so at eingin feilur var í tekstinum. Børnini minnast, hvussu hann altíð tók sær tíð til at fara aftur umaftur, áðrenn blaðið varð prentað at tryggja seg móti setifeilum.

So nógv broytist. Nú er